# Eg tori nógv betur nú

**Bert 14 ára gamli, Heini Gilstón Corfitz, hugtók áhoyrararnar í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið við sínum frálíku sanggávum**

STJØRNUBREYTIN 2004
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Mynd: 14 ára gamli havnarmaðurin, Heini Gilstón Corfitz, hevur frálíkar sanggávur, og framførslan hjá honum og Brandi Enni fekk Norðurlandahúsið á kók um vikuskiftið.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Tað feitasta var at flippa út saman við Brandi Enni. Eg havi aldrin roynt at renna millum áskoðararnar, og tað verður heilt avgjørt roynt aftur.

Bert 14 ára gamli havnarmaðurin, Heini Gilstón Corfitz, hugtók tey flestu, sum høvdu leitað sær í Norðurlandahúsið um vikuskiftið.

Heini er virkin í rokkbólkunum, Paradox og Toxic, og um vikuskiftið fingu fólk høvið til at hoyra frálíku sanggávurnar hjá 14 ára gamla havnarmanninum.

### Frálík ljóðgóðska

Framførslurnar hjá Heina fevndu um kórsang, og ungi havnarmaðurin royndi seg eisini sum solist.

– Tað var ómetaliga spennandi at verða við. Ljóðið í Norðurlandahúsinum var ómetaliga gott, og bara tað at standa á pallinum í Norðurlandahúsinum var heilt ótrúligt. Hetta tiltakið er frálíkt, og eg vóni sanniliga, at tað verður skipað fyri Stjørnubreytini aftur, sigur evnaríki Heini Gilstón Corfitz.

Heini greiðir frá, at hann var eitt sindur fjálturstungin, áðrenn hann trein á pallin í Norðurlandahúsinum til fyrru framførsluna leygardagin, men nervarnar fóru, tá hann byrjaði at syngja.

– Eg tori nógv betur at verða á einum palli eftir tiltakið um vikuskiftið, sigur Heini Gilstón Corfitz at enda.

# Tú fært íblástur

**Benjamin Petersen heldur, at Stjørnubreytin er bæði mennandi og kveikjandi fyri ungu tónleikararnar í Føroyum**

STJØRNUBREYTIN 2004
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

16 ára gamli gittarsnillingurin, Benjamin Petersen, úr Vestmanna hevur áður prógvað, at honum skulu føroyingar væntað av nógv í framtíðini. Hann hevur bæði roynt seg sum tónleikara í Danmark og Íslandi við frálíkum skoðsmálum.

Á tiltakinum, Stjørnubreytin 2004, spældi 16 ára gamli vestmenningurin instrumentala lagið Silvia, og hann royndi seg eisini saman við húsorkestrinum undir framførsluni hjá songfuglunum Brandi Enni og Heina Gilstón Corfitz.

### Íblástur

– Øll sum lúttóku í tiltakinum vóru á einum máli um, at dygdin á teimum ungu tónleikarunum er frálík. Eg eri eisini sannførdur um, at nógv fer at blóma úr tiltakinum, sigur Benjamin Petersen.

Hann vísir á, at tey ungu fáa íblástur at gera enn meir við tónleikin av slíkum tiltøkum. 16 ára gamli vestmenningurin greiðir frá, at fleiri av tónleikarunum á Stjørnubreytini hava ætlanir um at spæla saman í næstum.

– Vit hava tosað um at gera eitt rock-jazz jamm við blásarum, floytum og gittara os. fr. Eg eri rættliga spentur um, hvat vit kunnu fáa burturúr úr tí, sigur Benjamin Petersen at enda.



*Høgru megin, 16 ára gamli gittarsnillingurin, Benjamin Petersen, sigur seg veruliga hava fingið íblástur til at halda á við tónleikinum av tiltakinum Stjørnubreytin*



*Búgvi Jónleifsson spældi trummur*

# Ungu stjørnurnar glitraðu

**Fyrireikararnir eru væl nøgdir við Stjørnubreytina 2004. Steintór Rasmussen fegnast um góðu undirtøkuna fyri tiltakinum**

STJØRNUBREYTIN
*Pall Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tónleikararnir eru øgiliga væl nøgdir. Vit fyrireikarar halda eisini, at tiltakið eydnaðist betri, enn vit tordu at vóna frammanundan, sigur ein fegin Steintór Rasmussen.

Hann fegnast um frálíku undirtøkuna fyri tiltakinum, sum varð roynt fyri fyrstu ferð í Føroyum. Bæði til framførsluna leygardagin og sunnudagin var stúgvandi fult av fólki í Norðurlandahúsinum, og fyrireikararnir gjørdu tí av at skipa fyri eini eyka framførslu sunnukvøldið.

– Vit eru samanumtikið ómetaliga fegin. Alt riggaði væl, og tey ungu sluppu veruliga at blóma. Einstakar framførslur riggaðu væl, aðrar minni væl, og onkur skaraði heilt framúr, greiðir Steintór Rasmussen frá.

### Í øllum aldri

Fólk í øllum aldri leitaðu sær í Norðurlandahúsið um vikuskiftið at uppliva fremstu stjørnuskotini í føroyska tónleikaheiminum. Áhoyararnar fingu høvið til at síggja og hoyra solosang, kór, rokk, popp, klassiskt og dans.

– Umframt frálíkur framførslur, var eisini nógv til eyguni hjá áhoyrarunum. Hóast talan var um eina framførslu í hálvan annan tíma, keddu fólk seg ikki, tí har hendi nakað allatíðina, sigur Steintór Rasmussen.

### Musikskúlin sæst aftur

– Tað kann væl vera, at tað situr onkur evnaríkur trummusláari í Sørvági ella ein bassistur í Skopun, sum ikki er valdur út til Stjørnubreytina 2004.

Nakað soleiðis tók Steintór Rasmussen til á tíðindafundi fyri góðum mánaði síðan um Stjørnubreytina 2004.

Tað er rættiliga hugvekjandi, at millum tónleikararnar á Stjørnubreytini í ár, vóru bert tveir, ið ikki eru búsitandi í miðstaðarøkinum.

– Í ár vóru tað bert Brandur Enni og Benjamin Petersen, ið ikki eru úr Havn. Tað eru møguliga onnur uppløgd evni, men vit eru so ikki komin á tey á hesum sinni. Ein frágreiðing liggur í tí stóra arbeiði, sum Musikskúlin í Havn ger fyri tey ungu í Havn, heldur Steintór Rasmussen.

### Eftirmeting

Steintór Rasmussen dugir ikki við vissu at siga um tað verður skipað fyri Stjørnubreytini aftur.

-Vit skulu nú hava eftirmeting av tiltakinum. Tað krevur nógv arbeiðið at skipa fyri slíkum tiltøkum, men vit hava avgjørt fingið nakað at arbeiða víðari við. Tær royndir, við hava gjørt hesaferð, koma væl við, sigur Steintór Rasmussen at enda.



*Nógv ymisk instrument vóru at hoyra í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Heiðrun Petersen hugtók áhoyrarnar við sínum frálíka violinspæli*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Sjónleikurin hjálpti væl

**Tjóðhild Patursson, heldur, at bæði hon og Petur Meinhard Elleby komu væl frá uppgávuni sum frásøgufólk á Stjørnubreytini**

STJØRNUBREYTIN 2004
*Páll Holm Johannsen*
*pall@sosialurin.fo*



*Annað av frásøgufólkunum á Stjørnubreytini 2004, Tjóðhild Patursson, sigur, at hennara royndir sum sjónleikari hjálpt væl, nú hon fyri fyrstu ferð slapp at royna seg sum frásøgufólk*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað vóru ikki bert tónleikararnir á Stjørnubreytini, ið skuldu vera í aldrinum 13 til 18 ár. Fyrireikararnir góvu eisini teimum ungu møguleikan at royna seg sum frásøgufólk á stórsligna tiltakinum. Valið fall hesaferð á Petur Meinhard Elleby og Tjóðhild Patursson.

Tjóðhild og Petur skuldu sjálvi skrivað handritið til frásøguna, og hóast skotbrái var stutt, komu bæði væl frá uppgávuna. Tjóðhild Patursson greiðir frá, at hetta var fyrstu ferð, hon royndi seg um frásøgufólk.

– Eg havi spælt eitt sindur av sjónleiki, og tað hjálpir væl, tá tú skalt standa á palli. Eg kendi meg væl á pallinum, og eg haldi tað gekk væl, greiðir hon frá.

### Lata væl at

Tjóðhild heldur, at Stjørnubreytin er eitt frálíkt høvið hjá teimum ungu at sýna tónaleikaligu gávurnar.

– Undir tiltakinum møtti eg eina rúgvu av nýggjum fólki, og tað er altíð spennandi. Luttakararnir vóru ómetaliga dugnalig, og tað er ikki sørt, at vit javnaldrar øvunda teimum, sigur Tjóðhild Patursson flennandi.

Undan tiltakinum var hon rættiliga spent upp á, hvussu ymisku greinarnar sangur, dansum, rokkur og klassiskur tónleikum fóru at hóska saman.

– Hóast talan er um rættiliga ymiskar greinar, haldi eg, at tað riggaði avbera væl saman, sigur Tjóðhild Patursson at enda.

# Kenna okkum ikki so einsamøll longur

**Mia Káradóttir heldur, at Stjørnubreytin er eitt frálíkt høvið hjá klassisku tónleikarunum at fáa tættari samband við rútmiska tónleikin í Føroyum**

STJØRNUBREYTIN 2004
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Saman við Blásarakvintettini, Dávi Juul Magnussen og Heiðrun Petersen, umboðaði Mia Káradóttir klassiska íslettið á Stjørnubreytini 2004.

Mia Káradóttir spælir tvørfloytu, og herfyri vann hon virðisløn á tónleikastevnu í Danmark. Á Stjørnubreytini spældi hon sama stykkið, hon varð heiðrað fyri í Danmark.

– Vit, sum spæla klassiskan tónleik, hava onkuntíð kent okkum eitt sindur einsamøll frá teimum mongu rútmiskum bólkunum kring landið. Stjørnubreytin er eitt frálíkt høvið hjá okkum at koma í samband við rútmisku tónleikararnar, sigur Mia Káradóttir.

Hon leggur afturat, at fleiri av rútmisku og klassisku tónleikarunum á Stjørnubreytini hava ætlanir um spæla saman í næstum, og tað samstarvið gleiðir hon seg til.

### Frálíkur hýrur

Mia heldur, at øll á Stjørnubreytini komu ómetaliga væl frá sínum framførslum.

– Tað var ein ótrúligum stemningur í Norðurlandahúsinum, og øll vóru glað um tiltakið. Eg vóni veruliga at skipað verður fyri Stjørnubreytini aftur, tí tað er stórur tørvur á slíkum tiltøkum fyri tey ungu, sigur Mia Káradóttir a enda.



*Unga og evnaríka, Mia Káradóttir spældi sama stykki á Stjørnubreytini um vikuskiftið, sum hon herfyri fekk tónleikavirðisløn fyri á danskari tónleikastevnu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*